aftaná kendi hann seg ússaligan og illa til passar. Hann var tá leiddur aftur í skiparakahúttina og ballaður í koyggjuna hjá skiparanum. Men hann fekk einki varandi mein av hesum.

### Tvær ferðir deyðadømdur

Tá hann var liðugur at greiða frá, skoytti hann uppí:

„Tvær ferðir í mínum langa lívi á sjónum var eg deyðadømdur, men kom kortini frá tí við lívinum. Hetta var fyrru ferð. Hinaferð var árið eftir við Carlton, tá ið Pætur Franklin, bróður, gjørdi hitt stóra bragdið og bjargaði okkum.“

Søgan er tann, at Carlton fekk ein stóran sjógv, har alt brotnaði á dekkinum. Nógvur sjógvur kom niður í lugarið. Skipið legði seg eisini nógv á liðuna. Manningin hevði mist tamarhaldið á skipinum.

Pætur Franklin varð inntørnaður, men leyp upp. Hann sá, at tað sum skuldi til var at fáa fokkuna, sum var niðurdottin, upp aftur. Tað er ein longri søgu um, hvussu Pætur Franklin greiddi hetta, og semja var um, at hetta bjargaði teimum frá at ganga burtur hesa ferð.

Tá ið Mourits nú tekur samanum, sigur hann, at hann hevur havt eitt gott lív.

### Búði alla sína tíð á Kirkju

Mourits búði alla sína tíð í heimbygdini, úti á Kirkju, til hann fyri nøkrum fáum árum síðani flutti inn á Vistarheimið í Klaksvík, har eisini bróður hansara, Pætur Franklin, búði, inntil hann doyði fyri nøkrum árum síðani



*Teir tríggir beiggjarnir f.v. Eliesar, Pætur Franklin og Mourits*



*Við Carlton í 1934 Peter Petersen, Joen Jacobsen og Mourits Sørensen*

Mourist giftist 19. juli 1942 við Kristionnu Rasmussen av Kirkju, og búsettust tey á Kirkju. Kristianna, fødd í 1912 á Kirkju, var dóttir Pól Rasmussen norði í Stovu, kallaður Pól har Norði á Kirkju og Katrinu Mariu, f. Gullaksen úr Uppistovu í Hattarvík. Tey fingu børnini Katrin, f. 1942, Sunnivu, f. 1945 og Pól, f. 1950.

Langabbabørnini hjá Mourits eru átta í tali.

Kristianna doyði í 1987, og Mourits búði einsamallur heima, til hann á heysti í 1998 flutti á Norðoya Ellisog vistarheim.

Mourits hevur verið ein av teimum, sum hevur lagt lunnar undir samfelagið, og hetta eigur hann at verða takkaður fyri.

Ynskt verður honum hjartaliga tillukku við hesum stóra degnum.

**ó.**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Vermund Joensen**, ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Havn, andaðist týsdagin 27. mai á Landssjúkrahúsinum, 71 ára gamal.

Kistan við **Henning Vigantson Jensen** fer úr Klaksvíkar Sjúkrshúsi heim í Kristianskirkjuna fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13:30 úr Kristianskirkjuni.

**Lítli fitti Ari**, sonur Sunnvu Egilstoft og Emil Hentze í Sandavági, andaðist mikumorgunin, 2 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 14 úr Sandavágs kirkju. Tey, ið vilja minnast Ari, kunnu lata eina peningagávu til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum. Konta í Føroya Banka.

Kistan við **Tórbjørn Mikkelsen, Tórshavn**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Tórbjørn, kunnu lata eina gávu til Føroya felag móti Krabbameini.

Kistan við **Gunnhild Heinesen, Bøur**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í dag klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Bíggjar kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey ið ynskja at minnast Gunnhild, kunnu lata eina peningagávu til Bíggjar kirkju, konto í Eik.

## Tøkk

Kæru tit øll, sum gleddu meg á mínum sjeytiára degi 30. apríl, tá tit fjølment komu at heilsa mær.
Takk fyri gávur, heilsanir og tey mongu vøkru orðini, sum fullu.
Ein tøkk til tín góði John fyri eina sera góða yrking.

**Rasmus Glyvradal**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá góða kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Elisabeth í Stovuni**

andaðist og varð jarðað.
Takk til prestarnar fyri góð og troystarrík orð í kapellinum, heimi og kirkju. Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og til tykkum, sum bakaðu og hjálptu til við ervinum.
Takk til tykkum í Heimarøktini, sum vóru um hana.
Takk fyri kransar, blómur og peningagávur til Skálavíkar Kirkju.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Kjartan**
**Poul Johan, Elsa, Petur, Karolina og Jan Erik**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermóðir, omma og langomma

**Petrina Gudmundarson**
Hvalba

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til starvsfólkið á Sambýlinum í Hvalba, sum vóru um Petrinu síðstu tíðina
Tøkk til Símun Jacobsen, prest fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Sambýlið í Hvalba.
Eina stóra tøkk til tykkum, sum bakaðu og á ymiskan hátt hjálptu til við ervinum
Hjartans tøkk til tykkum øll, ið fylgdu Petrinu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Gudmund, Guðný, Gisla, Øssur og Trúgvi**

## Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg og komu inn á gólvið á mínum 90 ára føðingardegi 16. mai.

**Heilsan**
**Johanna Jacobsen**